**Álit**

**í**

**Løgtingsmáli nr. 55/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) (Tøknilig rætting viðvíkjandi innseting av skjali, umsitingarlig heimild at umsita stigvaksandi skatt og undantak fyri inntøku úr Grønlandi)**

Kristina Háfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur lagt málið fram 2. november 2018, og eftir 1. viðgerð 20. november er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 28. og 29. november og 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Ruth Vang, Pauli Trond Petersen, Kristin Michelsen, Bárður Nielsen, Bill Justinussen og Helena Dam á Neystabø) vísir á, at talan er um tríggjar smærri broytingar:

- at undantak verður givið fyri at rinda til eftirløn av inntøku, forvunnin í Grønlandi,
- eina áseting, sum skal tryggja, at TAKS fær neyðuga heimild at umsita nýggju skipanina við stigvaksandi skatti á eftirløn, sum kemur í gildi 1. januar 2019,
- at rætta ein feil, sum varð gjørdur í sambandi við eina lógarbroyting í vár.

Meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Jacob Vestergaard) tekur støðu í tingsalinum.

**Fíggjarnevndin, 4. desember 2018**

| | | |
|---|---|---|
| Ruth Vang<br>formaður | Bárður Nielsen<br>næstformaður | Helena Dam á Neystabø |
| Kristin Michelsen | Pauli Trond Petersen | Jacob Vestergaard |
| | Bill Justinussen | |